# Stórar ætlanir um jóansøkufestival og fløgu

**Tað er fallið suðuroyingum fyri bróstið, at sandoyingar ætla at halda ein tónleikafestival sama vikuskifti, sum jóansøka verður hildin í Suðuroynni. Hetta verður í Suðuroynni mett at verða heldur frekt og lítið sømuligt, og tí verður nú arbeitt við einum mótspæli, nevniliga einum jóansøkufestivali við góðum nøvnum á skránni. Eisini borgarstjórin á Tvøroyri metir tað vera óheppið, at sandoyingar leggja festival meðan jóansøka er**

FESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



At sandoyingar hava meldað út, at á jóansøku verður tónleikafestivalur á Sandi, er rættiliga fallið suðuroyingum fyri bróstið.

Jóansøkan er á Tvøroyri í ár og ikki gekk long tíð, innan ein áhugabólkur fór í gongd við at fyrireika eitt aftursvar til sandoyingar.

Ein fyrireikingarbólkur er farin í gongd við at fyrireika ein jóansøkufestival, nú jóansøkan fyllir 80 ár.

Í fyrireikingarbólkinum eru kendar tónleikakreftir á Tvøroyri, sum t.d. Tróndur Enni, Poul Arni Holm og Fróði Vestergaard. Men longu nú er eydnast at fáa vágbingar uppí eisini, so tiltakið gerst afturvendandi á hvørjum árið, bæði á Tvøroyri og í Vági.

## Frekt

Í fyrireikingarbólkinum verður mett, at tað er heldur frekt og ikki lítið virðiligt at leggja ein ferstival á Sandi sama vikuskiftið, sum onnur stevna er í sunnara enda av landinum, nevniliga 80 ára gamla jóansøkan. Fyrireikararnir siga, at vanligt hevur ikki verið at leggja slík stór tiltøk somu tíð, sum aðrar stevnur og gamlir siðir eiga sítt náttúrliga pláss.

Og tí er bólkurin farin til verka, hóast stutt skotbrá. Og fyrireikingarbólkurin til jóansøkufestivalin hevur ætlanir um at fáa stór nøvn á pallin. Fleiri av stóru føroysku nøvnunum koma ætlandi á lýsingarlepan, samstundis sum samband hevur verið við útlendsk nøvn, harav okkurt vísir seg væntandi at fara at bera til at fáa hendavegin.

## Sera óheppið

Borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, heldur eisini lítið um, at sandoyingar ætla at skipa fyri festivali, meðan jóansøka er í Suðuroynni.

- Tað er sera óheppið, at sandoyingar skipa fyri festivali, meðan jóansøkan er. Eisini tá hugsað verður um alt tað samstarv, sum annars hevur verið millum Sandoynna og Suðuroynna. Jóansøkan er eisini einasti inntøkumøguleiki hjá fleiri feløgum og er eitt tiltak, sum skal vera landsdekkandi, hvat Suðuroynni viðvíkir. Og hví skal festivalur nú verða á hvørjum tanga, so at onki verður í part til nakran?, spyr borgarstjórin á Tvøroyri, sum er sera harmur um støðuna.

Og býráðið á Tvøroyri harmast um støðuna og skal á býráðsfundi í næstum tosa um støðuna og um møguligan stuðul til ein jóansøkufestival í Suðuroynni.

## Jóansøkufløga

Jóansøkan fyllir 80 ár í ár og er á Tvøroyri í ár. Tí arbeiða tvøramenn við eini jóansøkufløgu, har teir mongu kendu songfuglarnir á Tvøroyri taka lut.

Nøvn sum Guðrun Sólja Jacobsen, Tróndur og Brandur Enni, Poul Arni Holm og Jonhild A. Nielsen eru við á fløguni. Upptøkurnar eru byrjaðar og fara fram í Skýrák í Havn.

Og í samband við fløgu og festival, so verður ein útgávukonsert ætlandi partur av jóansøkufestivalinum, har tey luttakandi fara á pallin, samstundis sum fløgan verður løgd fram.

Líkt er til, at suðuroyingar eru til reiðar at taka dystin upp og ætla ikki at loyva sandoyingum at taka jóansøkna uttan stríð.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 19, 2005
www.kaupthing.fo

# Fleiri nýggj størv enn væntað í USA

MARKNAÐARRÁK

Amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri apríl vísti ein arbeiðsmarknað, sum er í nógv betri standi, enn íleggjarar væntaðu. Heili 274.000 nýggj størv komu (væntað 174.000), umframt at talið fyri mars mánað varð uppmett við 36.000. Haraftrat hækkaðu bæði lønarvøksturin og miðal tímatalið í arbeiðsvikuni meir enn væntað. Soleiðis vísa allir partarnir av týdningarmiklu frágreiðingini á ein amerikanskan búskap í sunnum vøkstri.

## Lánsbrævarenturnar enn metlágar

Lánsbrævarenturnar hildu sær á metlága stiginum í farnu viku. 10-ára rentan kom ikki langt frá botninum á 3,43%. Nógv verður tosað um lækkandi búskaparvøksturin í USA sum eina orsøk til lága rentustigið. Hann er tó oman fyri 3,5%, og arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin man eisini gera sítt til, at tað ikki verður amerikanski búskapurin, sum fær skyldina fyri lágu renturnar.

## Hampuligir roknskapir

Eftir at partabrøv hava havt nakrar torførar dagar, hækkaðu t.d. tey norðurlendsku 1,6% eftir bjørtu arbeiðsmarknaðarfrágreiðingina. At oljan aftur er hækkað hevur tó tálmað gongdini nakað. Í USA eru roknskaparkunngerðirnar fyri 1. ársfj. um at vera av, tó vanta t.d. Cisco, Dell og HP at kunngera. Higartil hava inntøkurnar verið 4,4% betur enn væntað og 14,2% hægri enn fyri ári síðani. Sostatt hava roknskapirnir verið hampuligir, og fara neyvan at tálma gongdini í næstum.

## Hesa vikuna

Hesa vikuna verða mest áhugaverdu lyklatølini handilsjavnin fyri mars og smásølan fyri apríl úr USA. Úr Evropu kemur bruttotjóðarúrtøkan hjá evrulondunum. Íleggjarar fara at leggja størsta dentin á USA. Handilsjavnin hevur nógv at siga fyri dollarakursin, og hugt verður eisini eftir, um smásølan vísir somu sunnu mynd av búskapinum sum arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin. Um so er, stuðlar tað undir bæði partabrøvum og lánsbrævarentum.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 5,81 | 0,4% |
| JPY | 5,53 | 0,1% |
| GBP | 10,98 | -0,6% |
| NOK | 0,92 | 0,0% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 103,32 | -0,9% |
| Evru Lánsbrøv | 173,87 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 88,84 | 3,9% |
| Altjóða Vøkstur | 60,54 | 2,6% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*